# Heystnáttin

*Yrking eftir Jens Paula Heinesen, yrkt fyrst í 50'unum, Varðin, bd. 31.*

Legst á brekkur og varðar,
tá dagurin varliga skýmir,
eitt lag av háðandi myrkri,
ið kemur, tá ljósið rýmir.
Deyðin er altíð kvirrur
– tøgn gløðir honum úr eygum.
Náttin er hansara látur,
ið vekir hamin hjá deyðum.

Livnar í vátum lyngi,
á sýnum og gomlum gøtum.
Bøllutir steinar skakkir
vakna á víðum fløtum.
Vindar, ið fara og koma,
tættar og tungar nætur,
suða í deyðum grasi,
sum barnið móðurleyst grætur.

Livnar í svørtum botnum,
í homrum og djúpum gjáum.
Vitleyst berst móti lofti
látur úr tómum kráum.
Føðast og farast í hvirlum
náttarljóð undir fjøllum.
Vaksa í mannahugum
til súsan av ósæddum trøllum.

Deyðin – hin blánandi ævi
– ótaldar glanandi gátur.
Á háðandi heystarnáttum
hoyrir tú hansara látur.
Føtur, ið bangnir ferðast
á nátt yvir følnaðar urtir.
Rodnar ein kjálki í eystri,
ið blæsur náttina burtur?